# Alonso vann gølukoyring

**Tað var ein kátur Alonso, ið tryggjaði sær sjeynda sigurin í ár aftan á eina formel 1 koyring, ið var merkt av ruðuleika**

Formel 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Koyringin á Shanghai breytini gjørdist spennandi av teimum heilt galnu orsøkunum. Fyrstu nógvu umførini vóru sera lítið áhugaverd, við ongum, ið líktist yvirhálingum í fremra partið av flokkinum.

### Óhappið skapti spenning

Men so loysnaði eitt vegdeksul á breytini, og Montoya, ið lá á fjórða plássi, koyrdi á tað og punkteraði. Trygdarbilurin kom á breytina. Montoya var tvær ferðir í pit, fyrstu ferð fyri at skifta dekkið, og síðan fyri at fáa bensin. Tú hevur ikki loyvið at gera hetta í sama pitstoppið. Hetta var longu endin á dreyminum hjá McLaren um heimsmeistaraheitið fyri lið. Hetta er einki minnið enn ein gøla, at ein vegdeksil kann fara leyst á eini breyt, har fólk koyra útvið 300 km/t., tað eigur ikki at henda.

Fyri Montoya gjørdist dagurin uppaftur verri - í somu løtu sum trygdarbilurin fór av breytini, fekk Montoya motortrupulleikar og noyddist at gevast.

### Niðurslitin dekk

Men hetta var ikki einasta óhappið, á veg úr pittinum út at stilla bilin í byrjunarstøðuna, rendu Michael Schumacher og Christjan Albers saman. Báðir noyddust at byrja úr pittinum í eykabilunum. Hetta var klossutt og tápuligt, og sera menniskjaligt.

Albers kom ongantíð veruliga við í koyringina, og lá aftast alla koyringina. Michael Schumacher harafturímóti megnaði at koma eitt sindur frameftir. Hann var komin upp á tíggjunda pláss, tá hann knappiliga aftan fyri trygdarbilin snaraði runt av breytini og steðgaði upp. Hetta líktist eini koyrivillu frá roynda týskaranum. Hann greiddi aftan á koyringina frá, at dekkini vóru niðurslitin, og tá ein bilur beint framman fyri honum bremsaði, royndi hann somuleiðis at bremsa, men bilurin fór at snara. Hann segði seg ivast í, um hann hevði megnað í mál á so slitnum dekkum.

### Eldur í bilinum

Fernando Alonso vann koyringina, og varð ongantíð veruliga hóttur. Tvær ferðir hevði hann koyrt eitt stórt glopp niður til bilin á øðrum plássi, og tvær ferð kom trygdarbilurin á breytina og gloppið hvarv. Men hann megnaði alla tíðina at halda seg fremst.

Seinnu ferðina trygdarbilurin kom á breytina, var aftan á at indiski formel 1 koyrarin Narain Karthikeyan koyrdi av breytini við nógvari ferð, og bilurin rakti ein vegg. Bilurin endaði aftur á breytini har eldur kom í hann. Narain Karthikeyan var sitandi í bilinum, og nógv mundu halda ondina, tí tað er ongantíð hugnaligt at síggja, ein koyrara sita fastan í einum brennandi bili. Karthikeyan var eftir øllum at døma ikki greiður yvir eldin, tí aftan á eina løtu reisti hann seg og gekk óskalaður burtur úr óhappinum. Pulvur úr eldsløkkjarum og vrakpetti vóru um alla breytina, og uppruddingin tók eina góða løtu.

### Revsing til Fisichella

Ralf Schumacher koyrdi eina sera trygga koyring, hann megnaði væl hjálptur av trygdarbilinum at fáa triðja pláss aftan fyri Kimi Räikkönen, sum koyrdi væl, men ongantíð veruliga trýsti Alonso. Giancarlo Fisichella lá leingi nummar tvey, men misti plássið í pittinum til Räikkönen. Hann fekk somuleiðis eina gjøgjumkoyringar revsing, fyri at koyra sera spakuliga inn í pittin, seinnu ferðina trygdarbilurin var á breytini. Hetta gav liðfelaganum Alonso ein fyrimun, og gjørdi at Fisichella ikki noyddist at bíða, meðan Alonso skifti dekk. Revsingin gjørdi, at Fisichella endaði á fjórða plássi. Henda revsing kemur eitt sindur óvænta, tí fyri nøkrum vikum síðan gjørdi Kimi Räikkönen, júst tað sama, uttan at fáa nakra revsing. Sambært motorkappingarfelagskapinum FIA, er orsøkin tann, at síðan Räikkönen gjørdi hetta, hevur felagskapurin gjørt greitt, at hetta ikki verður góðtikið, og er ósportligt.

### Sato lítið sannførandi

Fyri Takuma Sato, ið koyrdi sína seinastu koyring fyri BAR-Honda, í seinastu koyring hjá BAR-Honda, var dagurin sum teir seinastu nógvu, øgiliga óheppin. Sato var ov ótolin og tjóvbyrjaði, hetta gav honum eina gjøgnumkoyringarrevsing. Eina løtu seinni koyrdi hann útav, soleiðis at nakrir koyrarar sluppu framvið honum. Miðskeiðis í koyringini fekk hann trupulleikar við gearunum, og noyddist at gevsast, og soleiðis endaði enn ein skuffandi dagur fyri japanska koyraran.



*Alonso vísti, at hann er tann rætti meistarin, tá hann í ársins seinastu koyring bukaði Kimi Räikkönen av*

## Úrslit á Shanghai breytini:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Renault | 10 |
| 2 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | 8 |
| 3 | Ralf Schumacher | Toyota | 6 |
| 4 | Giancarlo Fisichella | Renault | 5 |
| 5 | Christian Klien | Red Bull Racing | 4 |
| 6 | Felipe Massa | Sauber-Petronas | 3 |
| 7 | Mark Webber | Williams-BMW | 2 |
| 8 | Jenson Button | BAR- Honda | 1 |
| 9 | David Coulthard | Red Bull Racing | |
| 10 | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas | |
| 11 | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | |
| 12 | Rubens Barrichello | Ferrari | |
| 13 | Antonio Pizzonia | Williams-BMW | |
| 14 | Robert Doornbos | Minardi-Cosworth | |
| 15 | Jarno Trulli | Toyota | |
| 16 | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | |

Givnir

| | |
|---|---|
| - Takuma Sato | British American Racing Honda |
| - Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota |
| - Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes |
| - Michael Schumacher | Ferrari |

## Endaliga støðan

### HM fyri koyrarar

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 123 |
| 2 | Kimi Räikkönen | 104 |
| 3 | Michael Schumacher | 62 |
| 4 | Juan-Pablo Montoya | 60 |
| 5 | Giancarlo Fisichella | 53 |
| 6 | Ralf Schumacher | 45 |
| 7 | Jarno Trulli | 43 |
| 8 | Rubens Barrichello | 38 |
| 9 | Jenson Button | 37 |
| 10 | Mark Webber | 36 |

HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault F1 | 191 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 182 |
| 3 | Scuderia Ferrari | 100 |
| 4 | Toyota Racing | 88 |
| 5 | Williams-BMW | 66 |
| 6 | BAR Honda | 38 |
| 7 | Red Bull Cosworth | 34 |
| 8 | Sauber Petronas | 20 |
| 9 | Jordan Toyota | 12 |
| 10 | Minardi Cosworth | 7 |

# Ringt ár hjá Michael Schumacher

Við óhappinum í koyrigini í dag endaði ringasta kappingarárið hjá Michael Schumacher síðan hann í 1999 breyt beinið og sat uttan fyri í seks koyringar. Tá endaði hann fimtur í meistaraheitinum. Hann hevur verið heimsmeistari sjey ferðir, harav hevur hann verið heimsmeistari seinastu fimm árini. Í ár hevur hann als ikki kunnað fylgt við, og tað er ikki hent síðan 1996, tað árið hann skifti frá Benetton til Ferrari.

Michael Schumacher hevur koyrt formel 1 í fimtan heil kappingarár, tey bæði fyrstu árini hjá Benetton var talan um uppbyggingartíð av liðnum, og bilurin var tí ikki kappingarførur, og tað sama var galdandi fyri fyrsta árið hjá Ferrari, men hini árini hevur Schumacher altíð kappast um heimsmeistaraheitið.

Tí er hetta ein óvænd støða, har hann uttan nakra orsøk er í einum liði, ið ikki megnar at kappast um sigrar.

Hann segði við Forix.com aftan á koyringina, at nú gleddi hann seg til næsta ár, har Ferrari aftur kundi seta tingini uppá pláss. Hann helt eisini, at triðja pláss í kappingini um heimsmeistaraheitið var ikki at forkasta.

**-nud**

# Renault vann heimsmeistarahetið fyri lið

Koyringin á Shanghai breytini var tann síðsta í hesum formel 1 árinum, og tað vóru longu fleiri vikur síðan, at Fernando Alonso kundi rópa seg yngsta heimsmeistara í formel 1 nakrantíð, eftir var bara æra at berjast fyri hjá teimum flestu, umframt heimsmeistaraheitið fyri lið. Eins og í heimsmeistaraheitinum fyri koyrarar vann Renault heimsmeistaraheitið fyri lið.

McLaren-Mercedes megnaði als ikki at avbjóða Fernando Alonso í dag, og tá Montoya varð noyddur at gevast, var greitt at teir ikki fóru at klára at takað meistaraheitið frá Renault.

Ferrari høvdu ein sera ringan dag, við hvørgum bili í stigunum, men megnaðu alíkavæl at halda fæst í triðja pláss í kappingini um meistaraheitið fyri lið.

Minardi, Sauber, Jordan og BAR nøvnini verða ikki við í næsta kappingarárið, men av hesum var tað eintans Sauber, ið endaði við røttum ryggi. Felipe Massa fekk eitt sætta pláss, og hetta er eitt sera gott úrslit, har sveitsiska liðið við Ferrari motori smurdi Ferrari av, tó er triðj seinasta plássið í kappingini um meistaraheitið fyri lið ikki nøktandi fyri Sauber.

Jenson Button í BAR-Honda fekk eisini eitt stig, men áttanda pláss er als ikki nøktandi fyri bilin ið var næstur í meistaraheitinum í fjør, í ár gjørdist liðið nummar seks í meistaraheitinum.

Jordan og Minardi sluppu ikki í stigini í hesið koyringini. Men Tiago Monteiro á ellinta plássi, kann ivaleyst verða nøgdur við at hava hildið Rubens Barrichello í Ferrari aftan fyri seg. Hesið liðini fingu tey bæði aftarstu plássini í kappingini fyri lið 2006.

**-nud**